# Kvøða til ein orðasmið

**Til Jens Paula Heinesen frá Rithøvundafelag Føroya, á Landsbókasavninum 10. nov. 2002**

*Heðin M. Klein*



*Heðin Klein*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sum dropar av blóð eru orð.

Soleiðis eitur ein av bókunum eftir Jens Paula Heinesen, rithøvund og heiðurslim í Rithøvundafelag Føroya - eitt úrvalssavn við tekstum hansara, sum forlagið Sprotin gav út.

"Sum dropar av blóð eru orð" lýsir tað álvarsemi og ta - latið okkum bara siga - nøtrandi virðing, sum Jens Pauli heilt frá dreingjaárunum hevur havt fyri skaldskapinum, fyri orðunum. Og fyri skaldinum.

Orðini eru ikki løtt og meinaleys, heldur ikki tey, sum tykjast so, tí at øll eru tey lív og seta við sínum hvítu og reyðu blóðkroppum blóðblettir eftir seg, kanska eitt opið sár - kanska skorpnaða skruvu. Orðini, sum skrivað verða við blóði og ikki við blekki, orðini sum pína og gleða, sum særa og ugga, sum streyma í øllum kroppinum og sum dáttliga standa skorað so rimmarføst í hálsinum. Blóðorðini ella orðablóðið kunnu - ikki bara hjá rithøvundinum, uttan hjá øðrum við - vera ein spurningur um lív ella deyð.



*Jens Pauli saman við familju og áhugaðum á Landsbókasavninum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Nógv orð hevur hann skrivað, Jens Pauli - men hann hevur eisini skrivað nógv um orðini. Hann, sum á ungum árum setti sær fyri at "standa offrinum við lið ímóti bøðlinum" - og einki minni enn tað - hevur altíð havt eitt kolandi stikni til orðavargin við svævingarknívinum, tað politiska maktmenniskjað við sínum "orðablomstrum", sum sniðgongur og misbrúkar orðini fyrst til at tøla og lokka, og so til at kúga og knúska við tí einvísa endamáli, at tú skalt annaðhvørt klappa og rópa hurrá, ella eisini geva teg undir og falla í fátt og stinga í sekkin - og Jens Pauli Heinesen hevur ongantíð viljað hvørki. -

Hansara orð tøla eisini á sín vís, men tey spretta og blomstra tess betur, jú meira tey loysa seg frá høvundsins meginstjórnandi vilja og vilja sín egna vilja, sítt egna lív, sítt egna skilvísi og sín egna alheim.

Rithøvundafelag Føroya heilsar heiðurslimi sínum á sjúti ára degnum. Felag okkara hevur nógv at takka tær fyri, Jens Pauli. Tú vart formaður í Rithøvundafelagnum í 7 ár, frá 1968 til 1975, ein tíggjundapart av lívi tínum higartil. Og tú vart góður formaður, íðin og samvitskusamur, tað veit eg av egnum royndum, av tí at eg blaðungur sat í nevndini saman við tær. Tað var í tínari formanstíð, at regluligt samstarv við hini norðurlendsku rithøvundafeløgini kom í lag. Og nú aftur eitt álitið í mentamálum kom undan kavi, havi eg hug at nevna, at tað var Jens Pauli Heinesen saman við øðrum góðum fólkum, sum tók undangonguna í tí arbeiðinum, ið gjørdist Álit í mentunarspurningum 1973, tí fyrsta av sínum slag í Føroyum. Hetta yrkisliga avrikið hevur havt stóran týdning fyri tað, ið seinni varð gjørt, og hevur tað framvegis. - Tí var ikki meira enn rímiligt, at Jens Pauli Heinesen helt veitslurøðuna á 40 ára degnum hjá Rithøvundafelag Føroya, og at hann sama kvøldið varð kosin heiðurslimur felagsins, fyrst og fremst fyri síni bókmentaligu avrik sjálvandi, men eisini sum felagsmaður.

At enda fari eg at vera so framførur at lesa nøkur orð, eg royndi at seta saman fyri mongum árum síðani, og sum eg í hesum sambandinum havi hug at kanna honum, sum í ovurmorgin - líkasum øll onnur, ið hava lív og heilsuna - verður tveir dagar eldri enn í dag:

Putlari mikli
tú orða slúkur!
Orða havnari
leitar tú kræsin
depla søkjari snávandi
orðini upp, klíggjandi.
Orðini hál sum flundra
hvørt komma sliput
sum fiskur og tari
veksur sum sápa
í munninum.

So
býðst tú, láturliga klombur,
óboðin til
sum luft-akrobatur.
Aldrin tókst tú við læru
men breytst teg
staðar ókunnur
veg inn í sirkus.
Fólkini ilskast
øtlandi
eingin gitir hyggja
og færri hirða um.
Áðrenn tú undir dundrandi
látri
søkir tær legu
á skýggjum, í kyksendi
undir havsins botni
við blóðutum blómum
í munni.

Góði Jens Pauli. Rithøvundafelag Føroya sendir tær kvøðu á degnum komandi, felagsnevndin takkar tær fyri tøk í farnum døgum og ber tær og tínum bestu góðynski allar komandi stundir.



*Abbasonurin var við til hátíðarhaldið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*






# Axel minnist

**Axel Mortensen hevur givið út bókina »Úr farnum tíðum.« Bókin er, sum heitið sigur, minnisrit. Talan er um blaðgreinar, høvundurin hevur savnað í bók**

ÚTGÁVA
*Edvard Joensen*



Tvøramaður er hann, so rímiligt er, at tað, Axel Mortensen minnist úr farnum tíðum, er av Tvøroyri. Tað er eisini haðani, frásagnirnar eru.

Axel Mortensen er ættkærur maður, og tað kemur eisini til sjóndar í bókum hansara. Tí hendan, sum nú kemur, er ikki tann fyrsta. Nevnast kunnu »Bretsku konslarnir«, »Mortensen menninir«, og »Gloymdu ikki ættarbandið«.

Øll evni, ið viðkoma manninum sjálvum. Axel Mortensen var sjálvur í mong ár bretskur konsul í Føroyum. Ættarnavnið Mortensen dylur hann ikki, og ættarbandið, skrivað er um, er um Mortenseættina úr Øravík.

Í fororðinum sigur høvundin, at talan er um 18 greinar, hann hevur skrivað síðan 1986. Greinarnar eru um barna- og ungdómsárini á Tvøroyri, endan á slupptíðini, kirkjuna, hersetingina undir seinna heimsbardaga, náttúrulýsingar og mangt annað. Fleiri av frásagnunum eru í tveimum. Hava verið so mikið langar, at ikki hevur verið pláss í einari blaðgrein, skilst.

Í bókini eru nógvar myndir, sum sjálvandi, vil ein siga, ikki eru nýggjar. Tær lýsa í stóran umhvørvið á Tvøroyri í eini farnari tíð, eins og nógvar persónsmyndir eisini eru við.

Hjá tí, sum fylgt hevur við skrivin Axel´s í bløðunum, er ikki nakað nýtt í bókini sum so. Tað vil so vera, tá talan er um savn av blaðgreinum. Og viðmerkt er eisini fyri hvørja grein sær, nær og hvar tær hava verið prentaðar. Men áhugavert er at hava tær savnaðar á einum stað og gott at taka aftur í hjá tí søguáhugaða. Tí partur av okkara søgu er tað. Tað skerst ikki burtur.

Tilfarið er fjølbroytt soleiðis at skilja, at har eru bæði stuttligar og álvarsamar hendingar at lesa um. Ella sum tað stendr í lýsing, útgevarin hevur sett upp: »Her er tilfar til bros, eyðmýkt og stundum eisini blonk eygu.«




Bókin, sum fæst innbundin fyri 268,- krónur, er umbrotin og prentað á Dimmalætting.

# Ráðstevna um trivnað og heilsu

**Seinnapartin í vikuni, hósdagin og fríggjadagin, skipar Trivnaðar- og heilsuráðið fyri almennari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum**

RÁÐSTEVNA
*Edvard Joensen*

Ráðstevna undir hetinum »Trivnaðar- og helsumál nú og í framtíðini« verður hildin í Norðurlandahúsinum hósdagin 14. og fríggjadagin 15. november. Ráðstevnan er almenn.

Trivnaðar- og heilsuráðið sigur í tíðindaskrivi, at ráðstevnan fer at snúgva seg um viðurskiftini, sum í dag eru galdandi á trivnaðar- og heilsuøkinum í Føroyum. Mett verður um støðuna í løtuni, eins og viðgjørt fer at verða, hvussu vælferðartænasturnar fara at síggja út í framtíðini.

Fyrilestrar fara at verða hildnir, eins og eisini pallborð verða sett at viðgera tey ymsu temaini, sum tikin veðra upp á ráðstevnuni. Í hesum pallborðum fara sita umboð fyri heilsu- og almannaøkið eins og brúkarar og politikarar, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivinum.

Pallborðsluttakararnir fara at leggja fram síni sjónarmið, og síðan verður kjak um evnini, sum viðgjørd verða. Fundarluttakararnir fáa høvi at gera viðmerkingar og seta spurningar.

Sum vera man verður eisini hugt at líknandi skipanum, sum galdandi eru í okkara grannalondum. Eitt nú fer Doris Hansen, fyrrverandi formaður í MBF, at greiða frá royndum og fyrimyndum í øðrum Norðanlondum.

Eisini útlenskir luttakarar verða á ráðstevnuni. Stjórin fyri Statens institut for Folkesundhed i Danmark fer at halda fyrilestur. Íslendski landslæknin fer at halda ein fyrilestur, og heilsu- og sjúkrahússtjórin á Bornholm fer at siga frá viðurskiftunum á tí økinum á Bornholm.

Ráðstevnan verður sett hósmorgunin klokkan hálvgum níggju av Bill Justinussen, landsstýrismanni við heilsumálum.

Nú eru føroyingar so mikið væl fyri, at vit hava tveir landsstýrismenn á økinum, so Páll á Reynatúgvu, landsstyrismaður við almannamálum, fer at enda ráðstevnuna seinnapartin fríggjadagin.

# Trygd á sjónum

**Nóg mikið kann ongantíð tosast og lærast um trygd á sjónum. Og á Føroya Sjómansskúla verður eisini gjørt nakað við tað. Temadagur um hetta stóra evni verður á skúlanum fríggjadagin 15. november**

TRYGD
*Edvard Joensen*

Føroya Sjómansskúli skipar saman við Skipaeftirlitinum fyri skeiði um trygd á sjónum. Skeiðið verður hildið á Sjómansskúlanum fríggjadagin 15 november.

Í tíðindskrivi siga fyrireikararnir, at trygd á sjónum er ógvuliga stórt evni og fevnir víða. Stórur partur av undirvísingni á Sjómansskúlanum snýr seg um trygd á sjónum, verður sagt. Nevndar verða lærugreinar sum siglingarfrøði, skipstøkni, skipsfyrisiting, sjórættur, sjóreglur, GMDSS umframt fleiri aðrar. So eyðsæð er, at nógv er at taka í, tá talan er um trygdina.

Nevnt verður, at altjóða stovnar, sum eitt nú IMO, skriva eina rúgvu av reglugerðum og viðtøkum, sum fylgjast skulu, og tað krevur sín mann at seta seg inn í alt hetta.

Nevndir verða eisini í tíðindaskrivinum føroyskir og norðurlendskir stovnar, sum arbeiða við trygd á sjónum meira ella minni burturav. Eitt nú okkara egna sjóvinnufyrisiting, fiskiveiðieftirlitið, MRCC og Skipaeftirlitið.

Sum skilst er evnið ógvuliga rúgvusmikið, og tí er gjørt av at hava ein temadag um trygd á sjónum burturav. Ætlanin er so framhaldandi at gera hendan dag til fastan tátt, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivinum.

Temadagurin í ár er líkasum á byrjunarstigi, og tí eru tíð og evni eitt sindur avmarkað.

Evnini verða hesi: Trygd á sjónum í politiskum høpi, medesinkistukunngerðin, arbeiðsumhvørvi, GMDSS-skipanin umframt okkurt aktuelt evni.

# Fiskikapping og uppboðssøla

**Leygardagin skipar Bátafelagið á Bakka á Glyvrum fyri fiskikapping. Byrjað verður við brúnna Inni á Bakka, og eftir at allir eru afturkomnir, verður veiðan seld á uppboðssølu torginum við býráðshúsini**

FISKIKAPPING
*Edvard Joensen*

Bátafelagið á Bakka á Glyvrum boðar til útróðrar leygardagin tann 16. november. Lagt verður frá landi klokkan átta á morgni, og allir skulu vera aftur komnir í seinasta lagi klokkan fýra seinnapartin. Veiðan verður seld, og innkomin peningur fer til raksturin av Bátafelagnum.

Bátafelagið sigur í tíðindaskrivi, at tað skulu í minsta lagi vera tveir mans við hvørjum báti. Tilmeldingarskjal, sum samstundis vísir til reglur fyri kappingini, fæst við brúnna Inni á Bakka frá klokkan hálvgum átta leygarmorgunin.

Einki verður í tíðindaskrivinum sagt um, hvønn reiðskap loyvt er at brúka, men væntandi verður tað leysur reiðskapur, og ivaleyst fer tað eisini at standa í reglugerðini, sum útflyggjað verður leygarmorgunin.

Tá komið er aftur leygardagin seinnapart, fáa allir luttakararnir ein kaffimunn við onkrum afturvið. Ivaleyst skal eisini leggjast at aftur við brunna Inni á Bakka.

Tá avreitt er, verður gjørt upp, hvussu veiðan hilnast fyri hvønn mannin. Tríggir teir bestu bátarnir fáa steyp, sigur Bátafelagið í tíðindaskrivinum.

Klokkan 16.45 verður øll veiðan seld á almennari uppboðssølu á torginum við býráðshúsini, og vóna fyrireikararnir, at prísurin helst fer at liggja oman fyri tað, sum hann er á Toftum.